
*Lítla gentan í hurðini hevur vakt nógv høvuðbríggj* MYND: INNI

# Spøkilsið í Lamba

EINI HÚS Í **LAMBA** HAVA FINGIÐ NÓGVA **UMTALU** SEINASTU TÍÐINA. TEY ERU TIL **SØLU** HJÁ EINUM AV MEKLARUNUM, OG **MYNDIR** LIGGJA ÚTI Á NETINUM. Á MYND **NUMMAR 8** STENDUR EIN LÍTIL **GENTA** Í HURÐINI. ONGIN KENNIST VIÐ HESA GENTU, OG SØGUR HAVA GINGIÐ UM, AT HETTA VERULIGA ER EITT **SPØKILSI**...


**SPØKILSI**
Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Vit ringdu til ánaran av húsunum, Jack Mohr, og spurdu, um hetta veruliga passar.

Jack flennur: »Ná, eru søgurnar nú farnar at ganga í Havn«, sigur hann.

– Gentan er eitt tapet á hurðini. Tað hevur verið har í nógv Harrans ár, og tá vit keyptu húsini fyri 20 árum síðani, hildu vit, at handan gentan var so fitt, at vit lótu hana verða verandi, greiðir Jack frá.

Kona hansara Sunnuvá er úr Lamba, og so leingi, sum hon minnist, hevur handan gentan staðið har.

Jack fortelur at fólk eru blivin kløkk, tá tey eru komin inn til teirra.

Tapetið er klistrað á eina stongda hurð. Tapetið ger, at tað sær út, sum hurðin er opin, og ein genta hyggur út.

Frá meklarafyritøkuni siga tey, at nógv fólk hava ringt og spurt um gentuna í hurðini.

So tíanverri – ella tíbetur – spøkilsið í Lamba er gamalt og fitt, men bert eitt klisturmerki.

## KLUMMAN


*Áki Bertholdsen*

# Bilførarar einsamallir í verðini

Lat meg fyrst viðganga blankt: Viðhvørt eri eg nokk so ótolin í ferðsluni. Ikki so, at eg gevi øðrum bilførarum fingurin, men eg kann gott finna upp á at geva onkrum eitt lítið floyt, tá ið tað ikki gongur eftir vild.

Og tað ger tað verri enn so altíð í ferðsluni. Antin gongur tað ov skjótt, ella ov seint.

Vit hoyra javnan um bilar, sum eru tiknir fyri at koyra ov skjótt, men vit hoyra næstan ongantíð um bilførarar, sum eru tiknir fyri at koyra ov seint.

Tann, sum koyrir nógv, møtir teimum hvønn einasta dag -altso bilførarum, sum fara sillandi eftir vegnum sum áttu teir allan vegin einsmallir.

Teir fara so lystiliga trillandi við 50-60, har ongin sum helst umbering er fyri at koyra undir 80, og samla sær ein hala av ótolnum bilførarum aftanfyri, uttan at tað nervar teir tað allarminsta. Teir himprast heldur ikki við at brúka høvuðsvegir, sum sín egna, privata uppdyrkingarveg og parkera gleðiliga hálvir úti á vegnum ímeðan teir eru hjá seyðinum, ella fáast við stik ella hoyggj.

(Men áðrenn nakar fær lúnskar tankar um ljóshærd konufólk – ella kvinnuligar bilførarar yvirhøvur, skal staðfestast, at nógv størsti parturin av hesum bilførarunum er gamlir menn - og tað er nokk so sjálvsagt, tí enn er tað ikki vanligt, at eldri konur hava koyrikort).

Eg sakni, at løgreglan eisini ger meiri burtur úr at taka hesar fýrarnar, sum koyra ov seint og tveita bilin, har tað passar teimum, tí teir eru til líka stóran ampa í ferðsluni, sum nógvir av teimum, ið koyra ov skjótt. Ikki minst eru mong dømi um, at bilførarar verða provokeraðir yvir evni til óhepnar yvirhálingar. Well, sjálvandi skal mann ikki lata seg provokera, men verðin er ikki fullkomin.

Og hetta skal eisini vera ein áheitan á hetta slagið av bilførarum: Vælsignaðir, kemur ein bilur aftanfyri, sum koyrir skjótari, blinka til síðina, set ferðina niður og lat teir sleppa framvið.

Og nú, eg havi fingið luft, fari eg aftur at seta meg at hyggja at HM í fótbólti.


MYND: TILVILDARLIG

## INNIHALD

4 BAKGRUND: **ELTON JOHN TIL FØROYA**
7 TIPS: **STUDENTAKJÓLAR**
8 90 SEKUND: **BOGI ANDREASEN**
10 SAMRØÐA: **PER UNG GER STANDMYND AV ÓLAVI Á HEYGUM**
12 REPORTASJA: **FLAGTEKJUR Í ÚTLANDINUM**
14 TIL ARBEIÐIS: **JÓNHILDA MAGNUSSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 SAMRØÐA: **ÚR KUWAIT TIL HVALBA**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **GULARÓTSPANERAÐ FISKAFLAK**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Elton John / Mynd: Polfoto